# Neistin vann tryggan sigur

**Neistakvinnur vóru á vitjan hjá srandingum á Skála sunnudagin, og har vóru tær eirindaleysar og fóru avstað aftur við øllum.**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tað byrjaði sum ein tættur dystur, og tá tjúgu minuttir vóru farnir stóð á jøvnum 8-8, men tá hálvleikur var, varð støðan blivin 9-16. Tað skuldi visa seg at hesi sjey málini á muni, skuldu halda stik allan dystin, tí StÍF megnaðu ongantíð at toga seg tættari enn tað sama. Tað bleiv næstan til ein lætt-an dyst hjá Neistakvinnum, tá alt kom til stykkis.

## Nicoleta avgjørdi

Í Nicoletu Radu Hansen hevur Neistin ein framúr góðan leikara. Hon skoraði nærum av gomlum vana. Hon heilt einfalt hamraði ein bólt fyri, og annan eftir inn í málið, og tað tóktist ikki til at vera nakað, ið strandingar kundu gera, fyri at steðga sterku havnakvinn-uni.

Hóast Nicoleta var úti eitt fitt petti at øðrum hálvleiki, megnaðu ungu Neistakvinn-urnar at halda tørn, og eitt skifti vóru tíggju stig á muni.



*Neistin vóru snøgt sagt nógv betur á Skála sunnudagin*
*Savnsmynd*

**FAKTA**

**StÍF-Neistin 23-30 (9-16)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8 (1), Bára B. Danielsen 4, Sólfríð Christiansen 3, Ninna K. Johansen 3, Rósa Johansen 2, Ata Gregersen 2, Jóhanna í Króki 1.
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 11 (3), Ása á Neystabø 4, Anja heinadóttir 3, Rakul Magnussen 3, Elin Staksund 3, Rakul Augustinussen 2, Ása Christiansen 2, Unn J. Kregesteen 1, Anna Clementsen 1.
**Brotskøst:** StÍF 1, Neistin 3
**Útvísingar:** StÍF 3, Neistin 0
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen



*Lina Andriulyte kempar við VB-verjuna*

# VB hongur í

**Vágskvinnur vunnu í einum rótutum dysti vesturi á Eiðinum, móti einum skerdum Kyndlaliði, ið noyðist at vera Jóruna Ludvík fyri uttan, vegna skaða í eina tíð**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Stjørnan ríkur avstað, men bæði Neistin og VB ætla sær at geva teimum skarp-an gang. VB hevur fyri stuttari tíð síðan knúgvað Stjørnuni í Vági, so tað eru góðar vónir millum suðuroyingar, at VB fer at megna tað.

## Útlendskur styrkur

VB hevur fingið sær styrk í serbisku Mariu Milicevic, og fer hon saman við vágs-kvinnum og hinum báðum útlendsku leikarunum Daivu og Astu, at hjálpa VB við at gera eina seriøsa roynd, at náa Stjørnuni aft-ur og koma í finaluna, ið tær so helst ynskja at vinna.

## Týdningarmikil stig á vegnum

Sunnudagin var fyrsti dyst-ur, ið nýggji útlendski leik-arin hevði í VB-búnanum, og vísti hon í løtum, hvat hon megnar. Hetta fer óiv-að at verða betur, tá hon fær vant seg við umstøð-urnar í Føroyum.

Stigini, ið VB vann eru sera týdningarmikil, og hjálpir tað um støðuna í stríðnum við Neistan og Stjørnuna.

**FAKTA**

**VB-Kyndil 25-23 (15-10)**
**Málskjúttar:**
**VB:** Daiva Toumaite 10 (3), Laila Jespersen 5, Maria Milicevic 3, Christina Holm 2, Monika Samuelsen 2, Theresa Jespersen 1, Svava Vestergaard 1, Bára Mortensen 1.
**Kyndil:** Tordis Tróndarson 7 (1), Jacklin Djurhuus 6 (1), Lina Andriulyte 6 (4), Ronja Mikkelsen 2, Súsanna Petersen 2.
**Brotskøst:** VB 3, Kyndil 7
**Útvísingar:** VB 5, Kyndil 2
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen

# Stjørnan fer eftir øllum

**Klaksvíkskvinnur høvdu sunnudagin vitjan av kvinnunum úr Vestmanna, og dysturin var ongantíð í iva um at gleppa Stjørnuni av hondum. Tær komu millum annað heilt uppá sjey mál, áðrenn VÍF fekk nakað mál**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tá sjey mál eru á muni eftir bert 11 minuttum, tá eru góðar ábendingar um at munurin er alstórur á liðunum, og soleiðis var tað eisini í hesum førinum. Klaksvíkskvinnur vóru ov stórur biti hjá VÍF at svølgja, og noyddust tær úr Vestmanna tí heim aftur við ósigri í skjáttuni.

## Simona, enn eina ferð

Simona Petersen er ein sera sterk hondbóltskvinna, og hana eru tær úr Klaksvík sera fegnar um at hava á liðnum. Tað hava tær eisini allar orsøkir til at halda, tí ferð eftir ferð hevur Simona verið við til at avgjørt dystir, næstan einsamøll. Hetta hevur drigið hinar uppá eitt støði, ið ger at tær eru besta lið í landinum. Tó skal tað ikki skiljast sum at tað bert er henni fyri at takka, tí hon hevur eisini stak dugnaligar leikarar við liðina á sær, men við Simonu á liðnum, er tað sum um at alt fer uppí eina hægri eind.

**FAKTA**

**Stjørnan-VÍF 28-14 (16-7)**
**Málskjúttar:**
**Stjørnan:** Simona Petersen 9 (4), Hanna Mikkelsen 4, Anna Kristina Samson 3, Durita Christophersen 3, Bára Skaale Klakstein 2, Joan M. Djordjevic 2, Una Olsen 2, Edith Hansen 1, Lovisa Andreasen 1, Durita Mikkelsen 1.
**VÍF:** Rannvá á Rógvi 3, Ioana Rapa 2 (1), Torgunn H. Johansen 2, Fríða Marjunardóttir 2, Marita Johansen 2, Katrin Christophersen 1.
**Brotskøst:** Stjørnan 4, VÍF 1
**Útvísingar:** StÍF 2, VÍF 3
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Gun-Gregoriusen